## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, um kvøldið upp í hvassan vind. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og landsynningi og seinnapartin regn ella mjørki. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn, seinnapartin útsynningur og ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi og regn av og á. Hitin millum 3 og 7 stig.

Sigrid og Teitur spældu fyri føroyingum í London:

# Sungu seg inn í hjørtuni



*Sigrid Rasmussen og Teitur Lassen bergtóku føroyingar í Bretlandi við sínum vakra og inniliga sangi*

*Mynd Jan Müller*

**FØROYINGAR Í BRETLANDI**

*Jan Müller*

Tað var deyðakvirt og øll hildu andanum, tá tvey av okkara frægu og ungu tónlistafólkum , Sigrid Rasmussen og Teitur Lassen bókstaviliga sungu seg inn í hjørtuni á teimum umleið 70 føroyingunum, sum vóru komnir saman til eitt hugnakvøld í London týskvøldið. Alskurin til og longsulin eftir heimlandinum kom av álvara til sjóndar hesa frálíku hugnaløtuna á donsku sendistovuni í hjartanum av London, har føroyskur sendimaður nú eisini hevur sæti.

Sigrid og Teitur vóru krúnan á verkinum á samkomuni, sum tó eisini hevði annað gott og áhugavert á skránni. Har var frálíkur føroysku viðskeri frá Miklagarði og Mungát frá Restorffs. Røtt varð so eisini yvir eitt evni, sum føroyingar burturi sum heima vísa stóran ans, nevniliga eina møguliga framtíðar oljuvinnu. Har "breiddi" oljumálaráðharrin seg út tá hann er bestur, og har varð frumsýning av fyrsta føroyska oljufilminum, sum Statoil hevur latið gera frá fyrstu oljuboringini við Føroyar.

Eitt sera hendingarríkt og hugnaligt kvøld, sum fer at verða umrøtt í blaðnum í næstu viku.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷14 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | ÷9 |
| Ammassalik | ÷2 |
| Saint John's | ÷5 |
| Halifax | 1 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 7 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | ÷5 |
| Moskva | ÷8 |
| Berlin | ÷1 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷6 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 6 |
| Róm | – |
| Malorca | 12 |
| Athen | 5 |
| Malta | 12 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 24 |
| Sydney | – |
| New York | 7 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

**LUFTTRÝSTIÐ**




Eitt lágtrýst, 982 hPa sunnan fyri Ísland fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður í høvuðsheitum vestan fyri Føroyar.




Lágtrýstið vestan fyri Írland fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum sunnukvøldið.

**HITALAGIÐ**




Hitalagið mált frá 20/02 kl. 06[00]– 21/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 4,9°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

**AVFALLIÐ**




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 20/02 kl. 06[00]–21/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 73,7 mm


**Radio-verkstaður**

Umvæling av:
- Sjónvarpum
- Videotólum
- Hi-Fi

Vit umvæla:
PHILIPS
PANASONIC
SAMSUNG
og onnur merki

**Fokus ELEKTRONIK**
Reynstún 19 · Argir
Tlf. 311306 - Fax 311306





## VESTFALLSKYRRINDI

16. febr.: Fullmáni
19. febr.: Mánin næstur jørðini
23. febr.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. feb | 10.48 | 23.27 | 09.48 | 22.27 | 10.03 | 22.42 | 00.33 | 12.48 | 01.33 | 13.48 | 09.03 | 21.42 | 08.03 | 20.42 | 11.03 | 23.42 | — | 12.03 | 10.33 | 23.12 | 11.48 | — |
| 23. feb | — | 12.06 | 11.06 | 23.46 | 11.21 | — | 01.27 | 14.06 | 02.27 | 15.06 | 10.21 | 23.01 | 09.21 | 22.01 | — | 12.21 | 00.42 | 13.21 | 11.51 | — | 00.27 | 13.06 |
| 24. feb | 00.46 | 13.27 | — | 12.27 | 00.01 | 12.42 | 02.46 | 15.27 | 03.46 | 16.27 | 11.42 | — | 10.42 | 23.10 | 01.01 | 13.42 | 02.01 | 14.42 | 00.31 | 13.12 | 01.46 | 14.27 |
| 25. feb | 01.55 | 14.23 | 00.55 | 13.23 | 01.10 | 13.38 | 03.55 | 16.23 | 04.55 | 17.23 | 00.10 | 12.38 | 11.38 | — | 02.10 | 14.38 | 03.10 | 15.38 | 01.40 | 14.08 | 02.55 | 15.23 |

5 707265 100067 >